Til:

Umhvørvismálaráðið
umhvorvi@umhvorvi.fo

Tórshavn, tann 31. januar 2024

Hoyringsskriv frá Effo til uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni

Effo hevur veitt orku til føroyingar í yvir 100 ár og veitir í dag týðandi part av orkuni, sum verður brúkt í Føroyum. Harafturat hevur Effo í fleiri ár arbeitt við at veita føroyingum orku úr varandi orkukeldum, og vann Effo saman við Røkt eitt vindorkuútboð í 2021. Í dag framleiðir Effo ein týðandi part av samlaðu ravmagnsframleiðsluni.

Sum kunnugt, er neyðugt at orkuframleiðslan av ravmagni í Føroyum áleið 20-faldast næstu árini um Føroyar skal hava ein møguleika at røkka teimum málum, sum eru sett í sambandi við grøna orkuskifti. Effo ynskir at vera ein partur av hesum skifti, sum eisini sæst aftur í íløgum okkara seinastu árini og økta virksemi okkara á grønu leiðini. Í dag framleiðir Effo ravmagn úr vindorku og vit hava tikið stór stig at veita føroyingum grønar orkuloysnir til upphiting. Harumframt arbeiðir Effo við fleiri øðrum stórum og áhugaverdum verkætlanum innan grøna orkuskifti.

Royndir okkara vísa at skipanin og lóggávan er sera stirvin, avmarkandi og ógreið. Tí er tað gott at arbeitt verður við at endurskoða verandi lóggávu innan øki.

Mett verður tó ikki at hetta lógaruppskot í nóg stóran mun tekur hædd fyri og rúmar tí ovurstóra orkuskifti, ið skal fremjast. Uppskotið er ógreitt, og torskilt er at fáa greiðu á hvørjar karmar hetta lógaruppskot gevur Effo at virka undir frameftir.

Eitt nú er ógreitt hvørjar avleiðingar lógaruppskotið vil hava á eina verkætlan líknandi Eysturlund. Sum dømi:

- Møguleikar at fara undir verkætlanir, sum eru uttanfyri almenna netið
- Møguleikar at arbeiða við PtX verkætlanum

Harnæst kann nevnast, at tað er ógreitt hvørjar karmar og treytir verða settar til ein framtíðar elmarknað. Uppskotið leggur upp til ein marknað við varierandi prísum. Vit hava sera trupult at síggja hvussu privatir aktørar skulu gera íløgu í og tryggja hesar íløgur, tá óvissan er so stór um kostnað og orkumongd. Eisini eigur at vera tryggja at interkommunala elfelagið og/ella annað sølufelag hjá SEV er eitt sjálvstøðugt felag uttan nakað samanfall við felagið SEV og kemur at virka undir somu treytum sum aðrir aktørar.

Veitingartrygd er eitt lyklaorð, í dag og í framtíðini, tá tað kemur til orku. Tað er av alstórum týdningi at veitingartrygdin framhaldandi verður tryggja, samstundis sum hon ikki skal vera eitt haft um beinið fyri orkuskiftinum. Tískil eigur veitingartrygdin at verða bjóðað út.

Mett verður at uppgávan hjá SEV skal nágreinast enn meiri. Verandi lóggávuuppskot vil seinka orkuskiftið og elva til at tað vera færri, ið hava áhuga at luttaka í at fremja orkuskifti, ið annars er alneyðugt fyri at kunna lyfta hesa ovur stóru uppgávu, sum liggur fyri framman, og sum fer at krevja sera stórar íløgur í tað føroyska samfelagið.

Yvirskipað verður ikki mett at fjarhitavirksemi og elveiting hoyra heima í somu lóg og mælt verður til at fjarhitaparturin verður tikin úr lógaruppskotinum og ein serstøk lóg orða til fjarhitavirksemi.

Umframt omanfyri standandi viðmerkingar hevur Effo nógvar grunnleggjandi viðmerkingar til lógaruppskotið og mæla vit til, ístaðin fyri at dagføra verandi lóg, at ein bólkur verður settur saman at orða eina nýggja elveitingarlóg, ið tekur sjónarmiðini frá myndugleika, verandi aktørum og vinnuni við, so at lógin kann vera eitt gott tíðarhóskandi grundarlag við nøktandi karmum, nú stóra orkuskifti er fyri framman og stór tøk skulu takast.

Vegna Effo

Gunnar Nielsen